# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Málið ímóti Rumsfeld tykist ikki hava nógv upp á seg og ljóðar býttligt*

*Talsmaður hjá Pentagon*

# Rumsfeld meldaður fyri píning

**Ellivu fyrrverandi fangar í Guantanamo og Abu Ghraib draga nú fyrrverandi amerikanska verjumálaráðharran í rættin.**



*Fáar dagar eftir at hann fór frá, er Donald Rumsfeld meldaður fyri at hava góðkent, at fangar blivu píndir í Guantanamo og Abu Ghraib.*

Sakførarar úr fleiri londum, teirra millum USA og Týsklandi, hava gjørt av at stevna Donald Rumsfeld, tí hann góðtók, at fangarnir í Guantanamo og Abu Ghraib blivu píndir.

– Eg vænti ikki, at hann fer í fongsul. Eg og hinir sakførararnir høvdu verið nøgdir, um vit fáa hann dømdan fyri at hava góðtikið eina so skammiliga framferð, segði amerikanski sakførarin Peter Weiss við Reuters, tá málið ímóti Rumsfeld bleiv lagt fram í Berlin í gjár.

Í einari áheitan biðja sakførararnir týska ríkisadvokatin kanna, um týðandi amerikanskir embætismenn hava góðkent krígsbrotsverk í sambandi við bardagan ímóti yvirgangi. Hava teir tað, biðja sakførararnir ríkisadvokatin skuldseta embætismenninar. Millum teirra, sum eru nevndir í áheitanini, eru fimm løgfrøðiráðgevar í amerikonsku umsitingini.

Ein av sakførarunum, sum hevur skrivað undir áheitanina, er norðmaðurin Fredrik Heffermehl.

Hann sigur við NTB, at teir hava nevnt teir fimm ráðgevarnar við navni fyri at fáa staðfest, um teir hava givið umsitingini skrivar upplýsingar, sum kunnu hava verið medvirkandi til, at fangar blivu píndir í Irak.

Tveir av teimum fimm løgfrøðingunum hava verið ráðgevar hjá George W. Bush, forseta og Dick Cheney, varaforseta, og tveir aðrir hava arbeitt hjá Donald Rumsfeld. Amerikanski løgmálaráðharrin, Alberto Gonzalez, og fyrrverandi CIA-ovastin George Tenet, eru longu stevndir í málinum.

## Kann enda í varðhaldi

Eygleiðarar siga, at tað er ikki serliga sannlíkt, at Donald Rumsfeld endar í fongsli, men Fredrik Heffermehl heldur, at stevningin fer at ávirka fyrrverandi verjumálaráðharran.

– Hvørja ferð hann fer av landinum, noyðist hann at hugsa um, at hann kann verða settur í varðhald, sigur Fredrik Heffelmehl við NTB.

Týska ákæruvaldið skal nú taka støðu til, um tað skal fara undir at kanna málið, og roknað verður við, at tann avgerðin fellur eina ferð tíðliga næsta ár. Endar tað við, at málið verður reist, kann tað hava við sær eini altjóða galdandi boð um, at Rumsfeld og fleiri aðrir amerikanarar skulu handtakast.

Fyri tveimum árum síðani meldaðu týskir mannarættindabólkar Donald Rumsfeld, men málið varð lagt til viks, tí Rumsfeld skuldi júst á eina ráðstevnu í Týsklandi. Tað ljóðaði, at hann hevði ætlað sær at avlýsa ferðina.

Í Pentagon halda tey lítið um ætlanina at leggja sak ímóti gamla verjumálaráðharranum. Talsmaðurin, Bryan Whitman, sigur við Reuters, at tað, sum hann higartil hevur hoyrt um málið, hevur lítið upp á seg og tykist heldur býttligt.

Sakførararnir, sum hava reist málið ímóti Rumsfeld, gera tað vegna tíggju menn, sum hava sitið í Abu Ghraib-fongslinum í Irak, og ein, sum sat í Guantanamo-leguni. Sakførarin hjá tí seinasta sigur, at Mohammed al Qahtani bleiv ongantíð skuldsettur fyri nakað ta tíðina, hann var í Guantanamo. Kortini sat hann 160 samdøgur innistongdur í einum kliva, og hann slapp ikki at sova í tvey samdøgur. Sakførarin vil eisini vera við, at maðurin var fyri kynsligum ágangi, og at hann fekk forboð fyri at biðja, um hann ikki vildi samarbeiða undir avhoyringunum.



*Myndirnar av fangapíningini í Abu Ghraib skelkaðu heimin*

## STUTT SAGT

### SAS brýtur reglur

Fyrr í ár kom undan kavi, at 10 flogfør hjá skandinaviska flogfelagnum SAS høvdu verið í rutuflúgving, sjálvt um motorarnir ikki høvdu verið til tað neyðuga eftirlitið. Nú er komið fram, at tað sama er hent minst tvær ferðir síðani við flogførum av slagnum Airbus A321, sum felagið brúkar í evropeiskum rutum. Tíðindini hava fingið øði í myndugleikarnar, sum krevja, at innan hálvan desember skal SAS veita trygd fyri, at slíkt skal ikki henda aftur. Loftferðslustjórarnir í Danmark, Svøríki og Noregi siga, at teir umhugsa at revsa SAS. Helst fara teir at krevja, at mannagongdirnar í felagnum verða broyttar, og tað kann eisini hugsast, at felagið fær bót.

### Gamalt vrak

Fyri seks árum síðani funnu spanskir fiskimenn eitt skipsvrak á havbotninum ein lítlan fjórðing úr strondini við Valencia á sponsku eysturstrondini. Nú hava fornfrøðingar kannað vrakið, sum vísir seg at vera eitt rómverkst farmaskip, sum er sokkið har fyri umleið 2000 árum síðani. Umborð á skipinum hava fornfrøðingarnir funnið fleiri stórar krukkur við einum serligum slagi av fiskasós, sum teir ríku rómverjarnir plagdu at hava aftur við einum góðum døgurða. Vrakið, sum er 30 metrar langt, liggur á 25 metra dýpi, og spanskir søgufrøðingar halda, at tað hevur verið á veg úr Spania til Rom, men er rikið av leið og sokkið í illveðri.

### Verða verandi

Myndugleikarnir í Týsklandi hava boðað 190.000 útlendingum frá, at teir sleppa at verða verandi í landinum. Stjórnin í Berlin sigur, at fólk, sum hava bíðað meiri enn átta ár eftir uppihaldsloyvi, sleppa at verða verandi í landinum í tvey ár fyribils. Tey, sum eiga børn, fáa somu rættindi eftir at hava verið í Týsklandi í seks ár. Avgerðin hjá stjórnini sigur, at kunnu útlendingarnir útvega sær bústað og arbeiði og klára seg sjálvar fíggjarliga, verður uppihaldsloyvið longt.